## Sigursrøð brotin

Tá Brasil sunnudagin tapti 1-2 fyri Bolivia í 3.600 metra hædd í La Paz, var tað endin á einari góðari, brasilskari røð við 19 dystum uttan tap. Hóast dysturin hvørki hevði beinleiðis týdning fyri annað ella hitt av liðunum, segði brasilski venjarin, Dunga, at hann royndi sítt besta og brúkti spælarar, sum hann helt klára hæddina best.a



## Fótbóltur í hæddini

At avgerandi landsdystir verða spældir í 3.600 metra hædd, sum tann millum Bolivia og Brasil sunnudagin, hevur verið ein umstríddur spurningur í altjóða fótbóltssamgonguni, FIFA, sum fyri tveimum árum síðani setti forboð fyri, at undankappingardystir skuldu spælast á vallum hægri enn 2.750 metrar. Men fleiri av andisku londunum mótmæltu og forboðið var tikið burtur aftur í fjør.




**Høllin á Hálsi var fullsett, tá níggju sterkir menn leygarkvøldið kappaðust um at gerast Føroya Sterkasti Maður 2009**

Mynd: Álvur Haraldsen

# Sumbingar sterkastir

**Tað gjørdust tveir sumbingar, ið royndust best av øllum, tá ikki færri enn níggju mans leygarkvøldið kappaðust um at gerast Føroya Sterkasti Maður 2009. Heri Vestergaard vann framman fyri Sámal Jóhannes Hansen, og teir eru báðir sumbingar. Á triðja plássi var Torstein Madsen**



einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Sumbingar hava altíð verið tiltiknir fyri at vera sterkir. Kendastir av øllum munnu vera teir fýra beiggjarnir í Hørg, sum gingu undir navninum Hargabrøðurnir og vóru sagdir at vera øgiliga sterkir. Millum annað er søgn um, at hvalbingar sendu boð eftir teimum, eina ferð ránsmenn úr Írlandi gjørdu innrás í Hvalba. Hargabrøðurnir hildu seg til og fingu rikið írarnar aftur til sjós.

Onkur hevur hildið, at tað fyri tað mesta hevur reyp og breggj, tá tosað hevur verið um sterkar sumbingar. Eitt nú hava skemtisøgur verið, sum hin um sumbingin, ið ikki helt seg hava brúk fyri at vera doyvdur, tá hann var hjá tannlæknanum. Men so hvørt sum tað vísti seg, at pínan hevði hug at gerast ríkilig, bakkaði hann og viðgekk, at »omman var úr Vági«. So fekk hann sproytuna.

Um nakar av álvara hevur granskað í sumbiarstyrkini, vita vit ikki, men staðfestast kann í øllum førum, nú vit skriva 2009, at eingin er sterkari enn sumbingar. Vit skriva í fleirtali, tí tá kappingin um at gerast Føroya Sterkasti Maður var í ítróttarhøllini á Hálsi leygarkvøldið, vóru tað ikki færri enn tveir sumbingar, ið vóru sterkari enn hinir sjey, teir kappaðust við.

Annar sumbingurin, Heri Vestergaard, vann kappingina, ið stóð millum níggju sterkar menn, og hin sumbingurin, Sámal Jóhannes Hansen, gjørdist nummar tvey. Á triðja plássi kom Torstein Madsen, ið – okkum vitandi – ikki hevur røtur í Sumba, hóast tað ikki skuldi undrað, um so var, tí væl lá fyri hjá honum eisini…

### Verður endurtikið

Hetta var fyrstu ferð í 10 ár, at skipað var fyri kappingini, ið var afturvendandi tiltak tey árini, Regin Vágadal var í vælmaktini og eisini var til fleiri slíkar kappingar uttanlands. Somuleiðis skipaði hann fyri altjóða kappingum í Føroyum, og í fleiri ár vitjaðu útlendskir risar hendavegin fyri at kappast við Regin í kappingini, ið kallaðist Atlantic Giant.

Ein av stigtakarunum til kappingina hesa ferð var Bogi Hammer, sum sjálvur plagdi at hjálpa til, tá kappingarnar plagdu at vera fyrr. Og sum so ofta er við slíkum kappingum, var hann sjálvur við og kappaðist millum hinar. Bogi var sera vælnøgdur eftir kappingina og helt eisini, at hetta mundu teir fara at gera aftur eina aðru ferð.

– Hetta hevur gingið heilt einastandandi væl. Fólk tóku væl undir við kappingini, og hóast nógv onnur tiltøk vóru á skránni kring landið, umframt landsdystur, so var fult av fólki í høllini. At undirtøkan var so góð, gevur hug at halda fram, sigur Bogi Hammer, ið altso slær fast, at neyvan verður neyðugt at bíða í 10 ár aftrat eftir næstu kappingini av hesum slagnum.

– Kanska vit fara at skipa kappingina soleiðis, at hon annaðhvørt ár verður á ólavsøku og annaðhvørt ár á jólum. Fleiri av okkum, sum kappast, eru siglandi menn, so umráðandi er, at flest møguligum ber til at vera við. Nú fáa vit so at síggja, hvussu verður, men vit fara at tosa um, hvussu vit kunnu gera tað á besta hátt, so vit aftur kappast næsta ár. Eisini vita vit um fleiri aðrar, ið kundu verið við aftrat, og einir tveir høvdu skaðar, so teir ikki kundu vera við hesa ferð.

### Sum tann veikasti

Tað gjørdist longu beinanvegin nokk so greitt, at størsta kappingin óivað fór at standa millum júst teir báðar sumbingarnar. Sámal Jóhannes vann ta fyrstu greinina, men tá so Heri vann tær báðar næstu kappingargreinarnar, hevði hann lagt seg á odda í hálvleikinum, tá snotilig sprund komu inn at vísa fram vøkur undirklæði, meðan íðkararnir sluppu at hvíla seg.